

# Karina misti á stokkinum

**Hevði Karina Petersen svomið eins skjótt í finaluni á Oyggjaleikunum, sum hon gjørdi til føroyameistaraskapið fyrr í ár, so hevði hon tryggjað sær gull í 50 metra bringusvimjing**

Svimjing
*Eyðun/Jens Kr.*
*eydun@sosialurin.fo*

**Lerwick:** Karina Petersen var vónbrotin eftir finaluna í 50 metra bringusvimjing, og tað hevði hon eisini orsøk til. Tá ið Karina vann føroyameistarskapiðfyrr í ár, svam hon teir 50 metrarnarí bringusvimjing við eini tíð undir 26 sekund.

Hevði hon eisini gjørt tað í finaluni á Oyggjaleikunum, hevði hon vunnið gull, tí eingin av hinum svimjarunum kom undir 26 sekund.

Bæði Karina og landsliðsvenjarin vóru vonbrotin av, at tað ikki eydnaðist Karinu at vinna heiðursmerki – og helst tað gullið, sum hon kundi havt vunnið.

– Karina er skuffað av úrslitinum, og tað eri eg eisini. Hevði hon svomið so skjótt, sum hon gjørdi til FM, hevði hon bukað hinar av. Hon tóktist hava leiðsluna heilt fram móti endanum, men misti á stokkinum.

– Vit ætla at analysera, hvat tað var, sum gekk galið, men vit vita eisini, at tað er ein nýggjur dagur í morgin, segði landsliðsvenjarin Petur Heðin á Fløtti eftir kappingina.



*Føroysku kvinnurnar ovast á sigurspallinum í svimjihøllini í Clickimin ítróttardeplinum mánakvøldið. Sigurin í stafettini var søguligur, tí hann var tann fyrsti hjá kvinnunum nakrantíð í Oyggjaleikum*

# Gyltu kvinnurnar gjørdu bart

**Lerwick: Smílini vóru stór, armarnir vóru á lofti, og úr andlitunum lýsti stoltleikin, tá ið teir fýra kvinnuligu svimjararnir hjá Føroyum vunnu fyrstu stafettina nakrantíð á Oyggjaleikum**

SVIMJING
*Eyðun/Jens Kr.*
*eydun@sosialurin.fo*

**Lerwick:** Føroyska kvinnustafettin í 50 metra frísvimjing setti undan finaluni mánakvøldið kós ímóti gullinum.

Tey, sum varða av svimjingini, vistu, at tað kundi ber til, um svimjararnir svumu upp ímóti sínum besta.

Og tað gjørdu tær.

Og tað bar til.

Shaila millum Garðarnar, Lisbeth L. Joensen, Nathalia Reinhardt og Elspa Mørkøre svumu Føroyar á mál á einum tryggum fremst plássi, og harvið vunnu tær eitt søguligt gullmerki til føroyska svimjing.

– Hatta var ordiliga gott. Vit høvdu ikki roknað við hesum, men vit vónaðu tað, segði 13 ára gamla Elspa Mørkøre, eftir at hon sum seinasti svimjarin í stafettini hevði svomið gullið heim til Føroya.

– Vit vistu, at kjansurin var har. Vit gjørdu okkara besta, og tað bar til, segði elsti svimjarin á stafettliðnum, Shaila millum Garðarnar, sum er 23 ára gomul.

### Hildu leiðsluna allan vegin

Føroyska liðið legði seg á odda tíðliga í kappingini, og munurin millum Føroyar



*Elspa Mørkøre var eitt sindur skadd í økslini, mentað forðaði ikki 13 ára gamla svimjaranum at svimja gullið heim til Føroya á teimum seinastu 50 metrunum í stafettini*